## List, bøn og kvirra

**Mariukirkjan:** Leygardagin 12. apríl og 19. apríl verður skipað fyri bønardøgum, har tann einstaki kann siga í kvirru og hugsa um Guds orð. Samstundis við hetta kann ein gerast varugur við síni listarligu evni, meðan ein hugnar sær saman við hinum luttakarunum. Bønardagurin byrjar kl. 14 og varir fram til kl. 19. Av tí at luttakaratalið er avmarkað er neyðugt at tekna seg hjá Sr. Mariu í Mariukirkjuni í Havn.



## Ungdómstúrur til summarvegin

**Oasan:** Nakrir ungdómar úr samkomuni Oasuni í Hoyvík ætla sær í summar at vitja tað norska toymið, sum vitjaðu tey á páskum í ár. Í hesum sambandi er ætlanin luttaka á eini legu sum á norskum kallast SOMMER VEJEN. - Eg havi ikki luttikið á hesi leguni áður, men eg havi sæð eina stóra broyting hjá teimum sum hava verið við. fyri tey var hetta eitt upplivilsi og eitt kick fyri andaliga lívið, sigur ungdómsleiðarin, Trygvi Dam. Farið verður av Havnini 30. juni og verður tey aftur 16. juli.

# Heimamissiónin skal gerast sjónligari

**Í kvøld byrjar ársfundurin hjá Heimamissiónini. Tey seinnu árini hevur hesin fundurin verið hildin í leguhúsinum í Nesvík, men verður í ár aftur í høvuðsstaðnum. Heimamissiónsvinir í túsundatali úr øllum landinum og í øllum aldrum savnast um vikuskiftið til møtir, framløgur, orðaskifti og felagsskapin**



*Sangur og tónleikur hevur altíð eyðkent Heimamissiónina*

*Mynd: mission.fo*

ÁRSFUNDUR
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Havn:** – Vit hava valt at flyta Ársmøtið til Havnar, millum annað fyri at gerast sjónligari í høvuðsstaðnum, sigur Vagn Foldbo, aðalskrivari hjá Heimamissiónini.

Hetta største einstaka tiltakið hjá hesi rørsluni er eitt av teimum, sum fólk kring alt landið síggja fram til. Teir dagarnar, sum ársfundurin er, hava tey eitt ríkt høvi at hitta fólk úr øllum landinum.



*- Tað er ov trongligt í Nesvík. Tí flyta vit ársfundin til Havnar, sigur Vagn Foldbo, aðalskrivari í Heimamissiónini*

Eitt slíkt vikuskifti hittast í túsundatali av Heimamissiónsvinum til tey mongu ymisku tiltøkini.

Síðani leguhúsið varð vígt hevur ársfundurin verið í Nesvík, men har gera ávísar avmarkingar seg galdandi í tí praktisku fremjanini av teimum mongu og ymisku tiltøkunum.

Hølini í leguhúsinum eru ikki nóg stór til kvøldmøtini, og tí hevur ofta verið sera trongligt í húsinum hesar løturnar. Tí varð avgerð tikin um at flyta tey aftur til Havnar.

- Við at hava ársfundin har, kunnu vit rúma nógv fleiri fólkum, sigur aðalskrivarin Vagn Foldbo. Og hann leggur aftrat:

- Og so fáa vit eisini gjørt okkum sjónligari í høvuðsstaðnum og millum føroyingar í síni heild.

Ársfundurin verður hildin partvíst í Vesturkirkjuni og partvíst í Meinigheitshúsinum.

### Heimamissión í 104 ár

Í 1904 kom fyrsti danski trúboðarin úr Indre Mission í Danmark til Føroyar at arbeiða. Í dag eru yvir 20 lønt starvsfólk hjá Heimamissiónini, sum gjørdist føroyski í 1990.

Tey løntu starvsfólkini eru: Aðalskrivari, missiónsskrivari, trúboðarar, sjómanstrúboðari, starvsfólk í útimissión, ungdómsráðgevi, barnaráðgevi, blaðfólk á blaðnum Trúboðanum, layoutfólk, forlagsleiðari, fíggjarleiðari, skrivstovufólk, fyristøðufólk fyri Leguhúsið og hjálpartrúboðarar.

Kring landið gera í hundraðtali av fólki eitt trúfast og sjálvboðið arbeiði í teimum lokalu missiónshúsunum.

### Gav alt

Tá ársfundurin hevur verið fyriskipaður, er tað altíð gjørt undir eini ávísari yvirskrift. Heitið hesaferð er: Hann gav alt!

Heitið gongur aftur á møtunum fríggjakvøldið í Meinigheitshúsinum, og leygarkvøldið og sunnukvøldið í Vesturkirkjuni. Tá verður heitið lýst við hesum evnum: Hann gav alt fyri einki; Hann gav mær alt, eg eigi og Hann er mín fyrimynd.

Tað verða Árni Jacobsen, Torleif Johannesen og Símun Jacobsen, sum fara at tala um hesi evnini.

Kjarnin í øllum vikuskiftinum eru tær frágreiðingarnar og tað orðaskiftið sum leygardagin verður um arbeiðið hjá Heimamissiónini. Hesaferð er serligur dentur lagdur á at gera eitt ársmøti fyri allar aldursbólkar.

### Úti og heima

Leygardagin fyrrapart verður nevniliga høvi at viðgera og skifta orð um barnaarbeiðið, ungdómsarbeiðið og arbeiðið í stýrinum fyri tey einstøku missiónshúsini kring landið.

Til at lýsa hesi evnini hevur ein fingið Sigrun Mikkelsen at viðgera barnaarbeiðið í dag, í morgin og um 10 ár. Ungdómsarbeiðið fer Christian Joensen at viðgera, meðan Kristian Davidsen viðger stýris- og nevndararbeiðið.

Seinnapartin leygardagin verða frágreiðingar givnar um arbeiðið og um fíggjarstøðuna, eins og kikarin verður settur á útimission og gevaratænastu.

Á ársmøtinum verður eisini skipað fyri einari serligari barnaskrá fyri børnini. Umframt vanliga barnaskrá verður eitt stórt barnamøti í Vesturkirkjuni sunnudagin kl. 16, har boðan, kór og drama verða á skránni.

## Cambodia skal viðgerast

Í eina tíð hevur verið arbeitt við spurninginum um, hvussu útimissiónarbeiðið hjá Heimamissiónini skal skipast í framtíðini.

Herfyri vóru fýra mans á eini ferð í Cambodia, við tí endamáli at kanna umstøðurnar og møguleikarnar fyri at byrja trúboðaravirksemi í landinum.

Enn er eingin støða tikin til henda spurningin, og tað verður hann heldur ikki fyrrenn Heimamissiónsfólkið er kunnað um tað og hevur sagt sína hugsan um henda spurning.

Júst hesin spurningurin verður tí uttan iva eitt av málunum, tá orðaskifti verður um arbeiðið seinnapartin leygardagin.

– Vit ynsktu at taka málið upp á ársfundinum, fyri at hoyra, hvat heimamissiónsfólk um landið siga.

- Vón okkara er eisini at fáa eina hilling á, hvat fólk halda um hetta málið, sigur Øssur Kjølbro, missiónsleiðari í Heimamissiónini við Trúboðan.